## Samkensluskriv frá Hoydal

Fyrr í vikuni sendi Høgni Hoydal, ráðharri í uttanríkismálum, danska starvsbróðuri sínum Per Stig Møller samkensluskriv í sambandi við bumbuálopið á donsku sendistovuna í Pakistan. "Hetta álopið kann ikki góðtakast undir nøkrum umstøðum. Sendistovur bæði standa fyri og umboða tað samskiftið, ið er grundleggjandi neyðugt fyri at byggja brýr millum heimspartar og mentanir. Í longdini er júst samskifti einasta haldgóða vápn í stríðnum fyri at skapa frið og semju í heimssamfelagnum" skrivar Høgni Hoydal m.a. í skrivinum. Vegna landsstýrið sendir Høgni Hoydal okkara samkenslu við offrunum og stuðul til Danmark í hesum málinum.



## Privatfólk stóran vinning

Einstaklingar høvdu 78 milliónir í kapitalvinningi av útlendskum virðisbrøvum í 2006, meðan vinnuligir og almennir íleggjarar í 2006 høvdu eina minking í vinningi av handli við útlendskum virðisbrøvum. Fyri einstaklingar var talið 78 mió. móti 44 mió. árið fyri, ein vøkstur á 77 prosent. Handilin við partabrøvum og øðrum váðafúsum virðisbrøvum gav ein vinning á 118 mió., meðan handilin við lánsbrøvum hevði eitt hall á 40 mió. Fyri vinnuligar og almennar íleggjarar var talan um ein kapitalvinning av útlendskum virðisbrøvum uppá 363 mió. í 2006 móti 488 mió. árið fyri, sum er ein minking uppá 26 prosent, sigur Hagstovan.

# Kunnu bert lata moralskan stuðul

**Tað kom sum ein skelkur fyri øll, eisini Georg Hansen, formann í Miðvágs Arbeiðsmannafelag, tá tey 70 arbeiðsfólkini á Fiskavirking í Miðvági vórðu søgd úr starvi og virkið stongt**

SAMRØÐA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonb@sosialurin.fo*

Georg Hansen, formaður í Miðvágs Arbeiðsmannafelag, er sera harmur um støðuna, sum er uppstaðin.

- Hetta eru ikki stuttlig tíðindi at fáa. Summi hava arbeitt á virkinum í 30 ár. Virkið hevur verið her í Miðvági síðani 1971, og tað eru bæði maður og kona, sum arbeiða her, so tað er ikki stuttligt hjá teimum, sigur Georg Hansen.

Hann sigur hetta vera eina skandalu fyri oynna og bygdina. Talan er um 70 arbeiðspláss úr øllum trimum bygdunum.

Eins og arbeiðsfólkið hevði Georg Hansen onga ábending fingið um uppsagnirnar.

- Eg varð uppringdur av virkisleiðaranum stutt undan fundinum klokkan tvey, og har fingu álitisfólkini og eg eina stutta frágreiðing um tað, sum fór at henda, sigur Georg Hansen.

Sum formaður í Miðvágs Arbeiðsmannafelag ásannar hann, at felagið sum so ikki fær gjørt so nógv við støðuna.

- Nei, tað er ógvuliga lítið vit kunnu gera, men vit fara at gera tað, sum stendur í okkara makt, fyri at hjálpa hesum fólkunum. Men vit mugu ásanna, at talan mest verður um moralskan stuðul, sigur Georg Hansen.

### Eingi alternativ

Eins og so mong onnur, undrast Georg Hansen á, at so nógv hevur verið strongt á, at gera tað lættari at fáa fremmanda arbeiðsmegi til landið.

- Teir hava lagt stórt trýst á politikararnar fyri at fáa fremmanda arbeiðsmegi inn í landi uttan trupulleikar, samstundis sum 70 fólk nú standa her uttan arbeiði, so eg eri bangin fyri at tað er, sum fakfeløgini alla tíðina hava sagt, at tað liggur okkurt annað aftanfyri, sigur Georg Hansen.

Hann heitir tí á øll arbeiðsfólk um at syrgja fyri, at tey fáa sína løn, og ikki lata tað ganga meiri enn 14 dagar.

Men fyri tey 70 fólkini, sum nú skjótt standa uttan arbeiði, er støðan vanlukkulig.

- Her vesturi er einki alternativ. Nú stendur teimum sjálvandi í boði at fara á onnur virki hjá Fiskavirking at arbeiða, men tá verður talan um stóra frástøðu, antin tað so er í Vestmanna, Havn ella enntá Runavík, sigur Georg Hansen.

Tað er nakað av lagnunar speisemi, at fólkið fekk boðini um afturlatingina inni í matstovuni, har eitt heiðursbræv hongur á vegginum, sum boðar frá, at virkið varð kosið til ársins virki í 2003.

- Tað kom sum ein skelkur á meg. Men vit hava alla tíðina verið bangin fyri, at hetta fór at henda, tá virkið varð privatiserað. Framman undan koyrdi tað fínt, og eg dugi framvegis ikki at síggja, hví nakað skal oyðileggjast, sum fungerar fínt. Tað eru myndugleikarnir, ið hava skuldina av tí, sigur Georg Hansen.

Formaðurin í Miðvágs Arbeiðsmannafelag ætlar at kalla fólkið saman til at tosa um støðuna, hóast hann sum nevnt ásannar, at tað helst ikki er nógv, felagið kann gera fyri tey uppsøgdu arbeiðsfólkini.



*Jón Brian Hvidtfeldt tosar við formannin í Miðvágs Arbeiðsmannafelag, Georg Hansen*
*mynd: Leo Poulsen*

# So fara vit bara til skips

**Tvey av starvsfólkunum á Fiskavirking í Miðvági, Siri Jóhansdóttir og Elin Johannesen, vóru, eins og hini, skelkað av uppsagnunum, men ungu genturnar hava ikki mist mótið, og fáa tær einki annað at gera, fara tær bara til skips**

SAMRØÐA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonb@sosialurin.fo*



*Siri Jóhansdóttir og Elin Johannesen eru millum tey 70 fólkini, sum fríggjadagin vórðu søgd úr starvi hjá Fiskavirking í Miðvági*
*Mynd: Leo Poulsen*

Tað er sjálvandi ójavnt, hvussu fólk eru fyri, eftir at boðini komu um, at virkið í Miðvági ikki letur upp aftur eftir summarfrítíðina. Hjá teimum ungu starvsfólkunum er allarhelst lættari at fáa okkurt annað at gera, men fyri tað var tað líka tung boð at fáa.

Tær báðar 19 ára gomlu, Siri Jóhansdóttir og Elin Johannesen, søgdu mest sum í ein munn, at tað vóru ræðulig boð at fáa.

Siri Jóhansdóttir hevur arbeitt á virkinum hjá Fiskavirking í Miðvági í hálvtannað ár, meðan Elin Johannesen hevur starvast har í hálvt ár.

Tær vóru millum tey 70 starvsfólkini, sum á matstovuni fingu tungu boðini um, at tey øll vóru uppsøgd.

- Tað var ein tungur stemningur, øll fingu ein rættiligan skelk, siga tær báðar.

Heldur ikki tær høvdu fingið minstu ábending um, at hesi boðini vóru á veg. Men tær eru sum nevnt báðar ungar, og tað gevur størri møguleikar.

- Vit vita ikki reiðiliga, hvat vit nú fara at gera. Tað er einki arbeiði at fáa í Vágum, so vit mugu av oynni at finna okkurt annað at gera, siga Siri Jóhansdóttir og Elin Johannesen.

Tær ætla sær ikki at taka av tilboðnum um at fara á annað virki hjá Fiskavirking at arbeiða.

- Nei, tá kundu vit heldur hugsa okkum at fari til skips, siga tær báðar.

Teimum hevur dámað ógvuliga væl at arbeitt á virkinum í Miðvági, og tær ætla sær at hanga í til virkið letur endaliga aftur um ein mánað ella so. Hvat síðani fer at henda, vita tær ikki enn, men møguliga fara tær at flyta til Havnar.

- Har er lættari at fáa arbeiði, siga Siri Jóhansdóttir og Elin Johannesen.